## Tey næstu um eitt ár

Ætlanin var, at Føroya Handilsskúli skuldi taka nýggjar næmingar inn til datamatikaraútbúgvingin a í heyst, men hetta verður av ongum. Hetta hevur ikki beinleiðis samband við uppsagnirnar hjá lærarunum á útbúgvingini, men avgerðin var tikin nakað síðani.

Ístaðin ætlar Handilsskúlin nú at taka teir næstu næmingarnar inn til datamatikaraútbúgvingina eftir summarfrítíðina í 2006.

Útbúgvingin hevur verið boðin út á Føroya Handilsskúla síðan 1998 og hevur øll árini verið lagað til donsku Datamatiker útbúgvingina. Í Danmark er útbúgvingin broytt og hevur hon somuleiðis skift heitið, hon eitur nú "Erhversakademiuddannelse (AK) inden for informationsteknologi", stytt Datamatiker AK.

Føroya Handilsskúli fer í komandi tíðarskeiðinum miðvíst at arbeiða við at laga føroysku TSÚ útbúgvingina til broyttu donsku útbúgvingina.

## Vegir stongdir

Sum vanligt er á Norðoyastevnu, verða nakrir vegir í miðbýnum í Klaksvík stongdir í sambandi við stevnuna.

Frá leygarmorgni kl. 11 til mánamorgun kl. 06 verður Vágstún stongt fyri allari ferðslu. Heldur ikki verður koyrandi á niðasta parti av Uppsalagøtu, og á Gerðagøtu, frá rundkoyringini og til Jógvan Waagsteinsgøtu, verður heldur eingin ferðsla. Á Bøgøtu verður bert koyrandi oman til Fossagøtu.

Leygardagin verður rennikapping mitt í býnum, og tá verður heldur eingin ferðsla eftir Skúlagøtu og parti av Biskupstøðgøtu.

## Fekk skallabrot

Fyrrapartin hósdagin hendi eitt ferðsluóhapp á Stangavegnum í Klaksvík. Ein ungur drongur, sum koyrdi á einum prutli, rendi saman við ein bil. Drongurin var ikki í hjálmi, og hann fekk skallabrot av óhappinum. Drongurin var fyrst koyrdur á Klaksvíkar Sjúkrahús, men varð seinni fluttur á Landssjúkrahúsið.

# Næmingarnir stúra fyri dygdini

**Leiðslan á Handilsskúlanum í Havn kláraði ikki at sannføra næmingarnar á datamatikaraútbúgvingini um, at seinasti parturin av teirra útbúgving fer at hava somu dygd sum higartil, eftir at lærararnir hjá teimum eru rýmdir av skúlanum**

ÚTBÚGVING

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Næmingarnir á datamatikaraútbúgvingini á Handilsskúlanum í Havn stúra fyri, at seinasti parturin av útbúgvingini ikki fer at hava neyðugu dygdina, nú lærararnir hjá teimum eru farnir til hús*

Fyrrapartin fríggjadagin vóru teir 11 næmingarnir á datamatikaraútbúgvingini á Føroya Handilsskúla í Havn kallaðir inn til fund. Orsøkin var, at lærararnir á útbúgvingini hava sagt seg úr starvi, tí teir kunnu ikki samstarva við leiðsluna á skúlanum. Tí skuldi leiðslan leggja eina ætlan fyri næmingarnar um, hvussu teir kunnu gera sína útbúgving liðna á skúlanum.

Men hóast leiðslan royndi at vissa næmingarnar um, at teir kunnu gera sína útbúgving liðna á skúlanum á fullgóðan hátt, so kenna næmingarnir seg ikki vísar í hesum.

– Vit stúra fyri, at restin av útbúgvingini fer ikki at hava somu dygd, sum útbúgvingin hevur havt higartil, siga næmingarnir, sum mangla góðar fýra mánaðir av teirra útbúgving, ið samanlagt er tvey ár og tríggjar mánaðir.

Leiðslan á Handilsskúlanum leitar nú eftir nýggjum lærarum, sum kunnu taka sær av seinasta partinum av útbúgvingini og føra næmingarnar til próvtøku, og starvsfólk á Handilsskúlanum skulu taka sær av arbeiðnum at gera eina lestrarætlan.

### Lestrarætlan avgerandi

Næmingarnir á Handilsskúlanum stúra serliga fyri lestrarætlanini, sum skal gerast til útbúgvingina. Hendan lestrarætlan er eitt krav fyri, at útbúgvingin kann viðurkennast, og tá onkrir av næmingunum ætla sær at søkja inn á útbúgvingar uttanlands, verður lestrarætlanin avgerandi fyri tey.

– Vit halda, at gomlu lærararnir høvdu verið teir bestu til at gera lestrarætlanina. Tey hava eina vitan og innlit í útbúgvingina hjá okkum, sum onnur ikki kunnu fáa uttan víðari. Tað vóru ikki pengar til at gera hesa lestararætlan, men nú vil leiðslan finna pengarnar til hetta arbeiðið.

– Men vit eru bangin fyri, at lestrarætlanin ikki fer at liva upp til tað, sum krevst á hesari útbúgvingini, og í øllum førum er tað ein vansi, at skrivstovufólk á Handilsskúlanum, sum ikki hava innlit í útbúgvingina, skulu gera lestararætlanina í samráði við fakfólk uttanífrá, halda næmingarnir.

### Próvtøka við tveimum próvdómarum

Næmingarnir á datamatikaraútbúgvingini skulu nú undir at gera endaligu verkætlanina, og hetta arbeiðið verður mánamorgunin sett í gongd av projektleiðaranum á Handilsskúlanum.

Men hóast leiðslan hevur lovað næmingunum nýggjar og fakliga góðar lærarar, so er tað ein vansi, at teir gomlu lærararnir eru farnir.

– Tað er trupult hjá nýggjum lærarum at seta seg inn í alt tað, sum vit hava verið ígjøgnum hesi tvey árini, og tí er avgjørt ein vandi fyri, at vit fara til próvtøku við tveimum próvdómarum og ongum lærara, sum kann hjálpa okkum gjøgnum próvtøkurnar, siga næmingarnir.

Næmingarnir siga, at teir hava havt sera gott samstarv við teir báðar lærararnar á útbúgvingini, og teir als ikki hava verið partur av stríðnum millum leiðslu og lærarar.

– Vit høvdu ynskt okkum, at somu lærarar, sum vit hava havt alla tíðina, kundu gera útbúgvingina hjá okkum lidna. So høvdu vit verið vís í, at dygdin hevði verið tann sama. Nú stúra vit fyri, at góðskan á útbúgvingini ikki fer at vera tann sama, siga næmingarnir.

# Føroyingar leggja fót fyri seg sjálvar uttanlands

**Løgtingsmaðurin Kári P. Højgaard ávarar føroyingar ímóti at stríðast ímóti hvørjum øðrum í útlandinum. Hann heldur, at føroyingar skulu gera sum mest fyri at finna semjur og standa sum ein maður uttanlands**

POLITIKKUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*– Vit sóu eitt dømi í Fólkatinginum nú um dagarnar, har annað føroyska umboðið legði eitt uppskot fram, og hitt umboðið boðaði frá, at tað fór at atkvøða ímóti. Tað førir ongan veg, um vit skulu stríðast soleiðis ímóti hvørjum øðrum uttanlands, sigur Kári P. Højgaard, løgtingsmaður*

– Vit hava ongan møguleika á millumlanda og altjóða stigi, um vit ikki standa saman sum ein maður.

Tað sigur løgtingsmaðurin Kári P. Højgaard, eftir at mál um ES og Norðurlandaráðið hava verið nógv frammi seinastu dagarnar.

– Vit sóu eitt dømi í Fólkatinginum nú um dagarnar, har annað føroyska umboðið legði eitt uppskot fram, og hitt umboðið boðaði frá, at tað fór at atkvøða ímóti. Tað førir ongan veg, um vit skulu stríðast soleiðis ímóti hvørjum øðrum uttanlands, sigur Kári P. Højgaard.

Hann heldur eisini, at málið um føroyska limaskapin í Norðurlandaráðnum vísir, at føroyingar hava ilt við at hava felags stev í einum máli.

### Semjan hvarv

Í vikuni boðaði danski forsætisráðharrin frá, at Føroyar sum er ikki kunnu fáa sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum, og hetta hevur løgmaður tikið til eftirtektar og vil brúka onnur amboð fyri at tryggja føroyingum størri ávirkan í norðurlendskum samanhangi.

Kári P. Højgaard er annar av føroysku limunum í Norðurlandaráðnum, og hann er misnøgdur við hetta.

– Fyri einaferð skyld høvdu vit eitt samt løgting, sum vildi hava sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum, og tað hevur havt sera stóran týdning. Løgmaður gekk burtur frá hesari samtykt og vísti til ein meiriluta í uttanlandsnevndini hjá løgtinginum. Tað er ikki nóg gott, heldur Kári P. Højgaard.

### Taka ósemjur við uttanlands

– Semjan um norðurlendska limaskapin varð gjørd av øllum tinglimum í seks flokkum, men í uttanlandsnevndini sita bara fimm flokkar, og tað er løgið, at løgmaður skal kunnu ganga burtur frá hesari semju, uttan at allir flokkarnir aftur hava viðgjørt málið.

Kári P. Højgaard heldur, at málið um limaskap í Norðurlandaráðnum er so týdningarmikið, at føroyingar skulu tosa væl og virðiliga um tað innanhýsis, og síðani fara út sum ein maður.

– Nú er vandi fyri, at vit aftur koma at hava okkara egna politiska stríð við okkum uttanlands, og tá fáa vit einki ígjøgnum, sigur hann.